

*Strúkaratónarnir til »Nú brennur tú í mær« góvu hesum lagnum heilt nýggjar dimensiónir*

# Eivør ger, sum hon vil



*At Eivør er víttfevnandi í tónleiki sínum, er eingin ivi um. Ein gimsteinur, har ymsu facettirnar bert bíða eftir at ein klútur skal taka eftir teimum, áðrenn tær endurspegla sólarglæmurnar*

**Hvat Eivør so enn ætlar sær við tónleiki sínum, so verður neyvan nakar trupulleiki í at røkka hesum. Leygardagin vórðu enn nakrar facettir í føroyska gimsteininum avdúkaðar – hesaferð í Norðurlandahúsinum**

UMMÆLI
*orð: Jákup Mørk*
*myndir: Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*

Norðurlandahúsið var leygardagin karmur um enn eina frálíka framførslu frá føroyska songfuglinum, nummar eitt. Eivør Pálsdóttir.

Hesaferð hevði Eivør fylgi av íslendska Kasahópinum, og lat tað verða sagt alt fyri eitt, at talan var um eina framúr samansetting, har ljóðførini hjá hesum á framúrskarandi hátt sampakkaðu við røddini hjá Eivør.

## Nærvera

Longu eftir fyrstu tónunum, sum streymaðu yvir salin, stóð greitt, at talan fór at verða um eina framførslu, sum fór at seta seg í minnini hjá áhoyrarunum. Við íslenskum fólkatónum við íblástri úr Sotlandi og Írlandi kundi lurtarin tað sama verið fluttur í onkra scenu í einum klassiskum írsku filmi, ella kanka til skotska hálandið fyri nøkrum hundrað árum síðani. Tónleikur snýr seg í grundini um at raka nakrar kenslur, og bara hesa fyrstu løtuna sýndu tær fimm í Kasa, at hetta var eitt kynstur, sum tær megnaðu til fulnar.

At Eivør eisini megnar hetta, mundu tey flestu vita, longu áðrenn hon trein á pallin, og skuldi nakar verið í iva, so var ivin burtur, tá konsertin var av.

Við fleiri av longu væl kendu løgunum, sum hon so ofta hevur framført, blandaðum saman við nøkrum nýggjum, fekk hon alt fyri eitt salin at kóka. Ikki soleiðis at fólk reistust upp á stólar at rópa og klappa, men heldur so, at tú kendi kenslurnar, sum fóru um áhoyrararnar. At Eivør so eisini á sín egna avslappaða hátt megnaði at skapa eina nærveru til áskoðararnar, gjørdi ikki løtuna verri í so máta.



*Til fleiri av løgunum sang Unn Patursson eina frálíka aðrustemmu*

## Valið er frítt

Fram um alt, so vóru tað tó tey nýggju elementini í framførsluni, sum hugtóku. At Eivør er víttfevnandi í tónleiki sínum, er eingin ivi um. Ein gimsteinur, har ymsu facettirnar bert bíða eftir at ein klútur skal taka eftir teimum, áðrenn tær endurspegla sólarglæmurnar.

Soleiðis gav nýggja lag hennara, sum hon fyri fyrstu ferð framførdi, Coloured Roads, eina greiða fatan av, at Eivør so sanniliga eisini er ein country-sangarinna í heimsflokki. Eru ambitión hennara at gerast millióningur av tónleiki sínum, er lættari hátturin helst at senda eina demo-fløgu til onkran Nashville-producara, og annars seta treytirnar sjálv. At hesar verða eftirlíkaðar, er helst eingin sum helst ivi um.

Alternativið er so at gera tað, sum henni lystir at gera við tónleikin. Tað fer so heilt víst eisini at bera á mál, tó at leiðin tá kanska verður nakað longri. Og so fer tað helst eisini at hava við sær, at vit her í Føroyum sleppa at síggja nakað meira til hennara, heldur enn at hon skal farta alla klótuna runt við framførslum sínum.

## Ein spurningur um tíð

Seinna alternativið tykist enn vera leiðin, sum Eivør hevur valt sær, og tí kunnu vit føroyingar enn fyri ein sámuligan prís sleppa at síggja og hoyra gullfugl okkara her heima.

Fyri at venda aftur til leygardagin, so var hetta júst eitt av kvøldunum, har Eivør aftur slapp at gleða okkum við nýggjum samansetingum av tónleiki sínum. Væl stuðlað av Kasa-hópinum, hevði hon frálíkar framførslur av fleiri av løgum sínum, men har var tó eitt lag, sum skaraði heilt framúr. Strúkaratónarnir til »Nú brennur tú í mær« góvu hesum lagnum heilt nýggjar dimensiónir. Dramatikkur, øsing og inniligheit fingu frítt at fara, og tá songrøddin samstundis var í eini nógv ráari útgávu, enn vit vanliga kenna hana, tóktist salurin nærum vera tikin av bóli. Klappsalvurnar eftir hetta mundu heldur ikki tikið nakran enda, og tvær mátti ein brosandi Eivør takka, soleiðis at hon kundi koma víðari í skránni. Hendan varð so rundað av við tveimum eykaløgum, áðrenn Eivør og hjálparar hennara hetta kvøldið takkaðu fyri seg. Enn einaferð høvdu føroyingar verið vitni til eina framúrskarandi framførslu frá hennara síðu, men kortini var tað við ikki sørt av sorgblídni, at klappsalvurnar vórðu avleveraðar. Tí við rúkandi menning hennara sum tónleikari, tykist tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn fremsti føroyski songfuglurin flýgur longur út í heim.

## Finalistarnir

**Umframt Guðuna Sólju Jacobsen, eru tað hesi fimm, sum hava vunnið seg fram til finaluna í Stjerne for en Aften**



***James Sampson.** Vinnarin úr fyrstu kappingini tykist framvegis teljast millum favorittarnar til endaliga heitið*



***Lene Mathiesen.** Lítli songfuglurin við stóru røddini bergtekur ferð eftir ferð við síni songgleði, men hon má kortini roknast sum outsidari*



***Martin G. Pedersen.** Somuleiðis ein av outsidarunum, men samstundis ein framúrskarandi sangari, sum eisini dugir at standa á einum palli*



***Jan Nielsen.** Elektrikarin, sum segði seg úr starvi eftir kappingina í fjør. Varð ikki stemmaður víðari í fyrsta umfari, men dómararnir góvu honum eitt wild-card til hálvfinaluna, og hesum tók hann av*



***Jacob Andersen.** Sangarin við skitnu røddini fekk prædikatið »heimsklassi« í hálvfinaluni, og saman við James og Guðrun verður hann roknaður sum favorittur at vinna finaluumfarið, tá hetta verður á skránni komandi fríggjakvøld*